

## Popczynski misti sigurin

Aarhus Fremad spældi um vikuskiftið ímóti Hobro í donsku 2. deild vestur. Liðið hjá Krzysztof Popczynksi spældi á heimavølli og stóð til at vinna dystin. Tá ið 10 minuttir vóru eftir at spæla, var Aarhus Fremad á odda 3-1, men seinastu løtuna skrædnaði hjá teimum og Hobro fekk tvey mál. Seinna málið var við brotssparki í síðsta minutti.

## Tem yvirlivdi í 2. deild

Søllerød/Vedbæk var í vanda fyri at flyta niður úr 2. deild eystur í Danmark, men felagið, har Tem Hansen spælir, bjargaði sær lívinum í deildini við einum góðum sigri á Stenløse í gjár. Nógv mál komu í dystinum, men tá ið dómarin bríkslaði fyri seinastu ferð, var støðan 4-3 til Søllerød/Vedbæk. Avgerandi málini í dystinum gjørdi Thomas Myssing, sum áður hevur spælt fyri Fremad Amager.

## Bjørk setti nýtt met

**Í sterkari kapping í Lyngby um vikuskiftið eydnaðist tað Bjørk Herup Olsen at kvetta 12/100 av metinum hjá sær á 1.500 metra teininum**

FRÆLSUR ÍTRÓTTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Bjørk tók um vikuskiftið lut í Lyngby Games, sum er ein av sterkaru kappingunum í Danmark.

Leygardagin var 1.500 meturin á skránni, og her kvetti Bjørk 12/100 sekund av føroyska metinum á teininum. Tíðin leygardagin var 4.44,71. Gamla metið átti Bjørk sjálv.

Men hóast metið, so eydnaðist tað ikki at vinna gull kortini, tá tvær aðrar kvinnur vóru enn skjótari enn føroyska essið á teininum.

Í so máta gekk betur sunnudagin, tá hon kappaðist á 3.000 metrum. Her eydnaðist tað nevnliga at vinna silvur við tíðini 10 minuttir og 20 sekund. Hetta eru tó fimm sekund seinni enn metið, sum Bjørk setti í Tårnby fyri fýra vikum síðani.

Á oyggjaleikum er Bjørk millum føroysku heiðursmerkjavónirnar, og tekur hon tá lut í kappingini á 5.000 og 10.000 metrum.



*Eitt føroyskt met, eitt bronsumerki og eitt silvumerki. Tað var úrtøkan hjá Bjørk Herup Olsen, tá hon um vikuskiftið tók lut í Lyngby Games*

07 Vestur-EB/Streymur 3-5 (2-1):

# Uppflytararnir mistu á stokkinum

*07 Vestur*

*EB/Streymur*

**Hóast teir vóru illa kroystir, so eydnaðist tað í evstu løtu meistarunum at vinna fulla úrtøku, eftir at teir høvdu fingið mál burtur úr trimum deyðbóltsstøðum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Tór-Ingar Akselsen og 07 Vestur høvdu meistararnar í sekkinum í 89 minuttir, men seinastu løtuna reistust Levi Hanssen og liðfelagarnir, tá tríggir deyðbóltar góvu trý mál*

*Mynd: Sofus D. Johannesen*

Um tvær vikur fer EB/Streymur at fáa vitjan av HB. HB er oddalið, og EB/Streymur er meistaralið. Meistararnir hava havt ilt við at fáa spælið at handa soleiðis saman, sum tað gjørdi í fjør, tá ið einki hefti fyri teimum, og teir bæði vunnu steypakapping og meistaraskap.

Hjá HB hevur tað higartil í ár gingið sum eftir ánni. Í gjár stevndi HB ímóti sigri á Toftum, men tað endaði við javnleiki. EB/Streymur var tríggjar ferðir aftanfyri í Sørvági, men tað endaði við, at meistararnir struku avstað við øllum stigunum.

Um tað hevði havt gingið, sum tað leingi sá út til, at tað skuldi gera, so hevði tað mest sum verið vónleyst hjá EBStreymi at komið sær upp í aftur meistaraspælið. Úrslitini í gjár bóru við sær, at EB/Streymur fær enn ein møguleika. Um tað eydnast at vinna, tá ið HB fer at vitja við Margáir, so verður teinurin upp til toppin so mikið lítil, at teir í EB/Streymi fara at hava orsøk til at trúgva uppá, at tað skal bera til.

Avrikið í Sørvági boðaði ikki frá meistaramøguleika. Tað eru nógvir góðir fótbóltsspælarar í Sundalagnum, men tað sást ikki í Sørvági. At tað kortini eydnaðist at vinna øll stigini komst fyri ein part av fullari nyttu burturúr trimum deyðbóltsstøðum, tá ið tað sá svart út:

Santos javnaði til 3-3, tá ið hann úr høgru sendi horna beinleiðis í málið, Arnbjørn Hansen var ein metur frá málstrikuni, tá ið hann setti krúllin undir hornasparksinnlegg úr vinstru, og so var 4-3 til meistararnar. Og so staðfesti Hans Pauli Samuelsen sigurin, tá ið hann sendi fríspark upp í málhornið.

### Betri uppiborið

Meistararnir fegnaðust, og tað var væl skiljandi. Avrikið hevði ikki verið so sannførandi. Í staðin fyri meistaraspæl høvdu teir verið kroystir og strongdir, men tað boðar sjálvandi eisini frá potentiali og dygdum, tá ið tað kortini eydnast at vinna.

Heimamenninir hingu við nevinum. Tað var lætt at skilja. 07 Vestur er uppflytari, og liðið er á niðurflytingarplássi. Men avrikini hava ikki bent á niðurflyting, og heldur ikki í gjár var talan um máttloysi og uppgávulyndi.

Heldur var tað tvørtur ímóti. Við Tór-Ingari Akselsen og Jens Erik Rasmussen á odda var 07 Vestur leingi omaná. Heimaliðið skoraði trý mál. Teir vóru tríggjar ferðir á odda, og teir høvdu møguleikar at økja um leiðslurnar, men teir kendu ikki sínar vitjunartíðir, og so endaði tað soleiðis, sum tað gørdi.

Eftir eitt korter setti Jens Erik Rasmussen hol á. Frísparksroyndin tók í manngarðin og snýtti fullkomuliga Gunnar á Steig í EB/Streyma málinum. Lítla løtu seinni varð Jens Erik púra leysur eftir langa framlegging frá málverjanum, Trygva Askham, men veteranurin fekk ikki tamarhald á bóltinum, og so var tann møguleikin burtur.

Tíggju minuttir undan steðginum varð javnt: Heimaverjan tøvdi, málverjin royndi at leypa út, og Sorin Anghel stýrdi við høvdinum bóltin upp um málverjan.

Tveir minuttir seinni var heimaliðið aftur á odda. EB/Streyma málverjin var óheppin, tá ið hann sendi bóltin út til Tór-Ingar Akselsen, sum takkaði fyri, spældi Jens Erik leysan, og veteranurin var tryggur.

Seks minuttir eftir steðgin javnaði Levi Hanssen. Hans Pauli Samuelsen legði innfyri úr vinstru, bólturin hoppaði einar tvær ferðir í brotsteiginum, og so var miðvallarin fyrstur á.

Tjúgu minuttir fyri leiklok legði Tór-Ingar Akselsen 07 Vestur framum aftur. Teir gjørdu skjótt av eftir fríspark, og Jens Erik Rasmussen spældi Tór-Ingar leysan.

Tá tóktist tað sum um, at heimaliðið skuldi vinna.

Men Sigfríður Clementsen spenti álopsbogan. Pætur Dam Jakobsen og Levi Niclasen vórðu skiftir inn síðstu løtuna, og tað eydnaðist!

Meistararnir stórfegnaðust yvir úrslitið, og uppflytararnir harmaðust. Tað var einki at siga til!